# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG

02
11



## Nýggja nevndin

www. pedagogfelag. fo

# Úr innihaldinum


| | |
|---|---|
| Oddagrein | 2 |
| Tíðindi frá felagnum | 4 |
| Felagið skipar fyri skeiði fyri allar limir um truplu samrøðuna | 6 |
| Aðalfundurin 2011 stóð í ljósinum av mannarættindasáttmálunum | 7 |
| Gestarøðarar á aðalfundinum | 8 |
| Nývalda nevndin og eykalimir | 11 |
| Val av internum grannskoðarum | 11 |
| Forkvinnan tekur samanum | 13 |
| Tíðindi frá felagnum | 14 |
| Leiðararáðið afturvalt | 16 |
| Stovnsvitjanir og limafundir saman við LÍV | 18 |
| Álitisfólkaskipanin munandi ment | 20 |
| Arbeiði í álitisfólkabólkum | 21 |
| Dagstovnaøkið | 21 |
| Serøkið | 22 |
| Dagtilboð til fólk við autismu | 23 |
| Studerandiforum í Helsinki | 24 |
| Bøkur frá Bókadeild Føroya Lærarafelags til børn og ung | 26 |


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag, Postboks 318
110 Tórshavn – Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# Oddagrein

Maud Wang Hansen, forkvinna



## Rættindi og sáttmálar

Aðalfundurin 2011 var ein góður dagur, sum stóð í ljósinum av mannarættindasáttmálum. Orð sum virðing, rættvísi og frælsi løgdu grundina undir kveikjandi orðaskifti, sum merkti enn ein aðalfund við nógvum áhugaðum limum.

Sáttmálasamráðingarnar eru nærum ikki lidnar, fyrr enn vit aftur hava sagt sáttmálarnar upp. Fakfelagssamstarvið hevur verið til fyrsta fundin við fíggjarmálaráðharran, Lønardeildina og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Okkara ynski um, at ovasti politiski myndugleikin tekur lut í samráðingunum er gingin okkum á møti. Vónirnar um góðar og effektivar samráðingar eru vaktar, og ætlandi hava vit ein nýggjan sáttmála undirskrivaðan tann 1.oktober 2011.

## Limafundir

Felagið hevur saman við LÍV skipað fyri limafundum kring landið, har vit hava umrøtt tryggingarviðurskifti og sáttmálasamráðingar. Trivnaðarkanningin á dagstovnaøkinum er løgd fram á tveimum limafundum, og tað hevur lagt upp til gott kjak og umrøðu av tí týdningarmikla og góða arbeiðinum, sum starvsfólk dagliga útinna.

Álitisfólkafundur og leiðarafundur vóru tann 11.mai, har leiðararáðið varð afturvalt, og nýggir tiltakslimir vórðu valdir. Lívligt orðaskifti var á báðum fundum um sparingar, og hvussu tær raka pedagogisku arbeiðsplássini. Meira verður at frætta um hetta. Seinni í ár skipar leiðararáðið fyri landsleiðaradegi.

## Politiskar raðfestingar

Politiskt vónloysi og eirindaleysar sparingar raka pedagogisku arbeiðsplássini, og fíggjarstýring gerst alsamt meira týðandi enn pedagogikkur. Leiðslur og starvsfólk mugu renna enn skjótari fyri at veita ta góðu tænastu, sum væntað verður, og eingin ivi er um, at øll gera sítt til, at avleiðingarnar skulu merkjast minst møguligt. Mín spurningur er, hvussu leingi starvsfólk klára at loysa allar uppgávurnar, uttan at tænastustøðið broytist. Normeringar, sum er ein sera týðandi partur í allari pedagogiskari planlegging, er vorðið eitt fløkt fyribrigdi, og torført er at finna inn aftur til upprunaliga grundarlagið undir hesum. Felagið fer at varpa ljós á normeringar í komandi tíð.

## Fakfeløg og samhaldsfesti

Fakfelagsarbeiðið er sett saman av fleiri pørtum; ein partur er fyrisiting og viðgerð av limamálum, tryggingar- og eftirlønarviðurskifti eins og sáttmálasamráðingar. Ein annar partur er tað politiska arbeiðið, sum eisini er ein sera týdningarmikil partur av fakfelagsarbeiðinum. Tað kann til tíðir tykjast harðligt og lítið semjusøkjandi, tá greinar verða settar í bløðini, og tá yvirlýsingar verða sendar út. Hetta er tó ein sera týðandi partur av tí at vera eitt fakfelag, og í nøkrum førum leggur hetta eisini beinleiðis upp til kjak og aftursvar frá teimum pørtum, sum vit venda okkum til. At vísa samhaldsfesti og at gera vart við viðurskifti, sum røkka út um okkara egna limabólk, er ein partur at samhaldsfasta stríðnum og er við til, at vit í trongdum støðum eisini kunnu vænta, at onnur taka undir við okkum. Fair-trade er eitt fyribrygdi, sum fakfelagsrørslan eigur at taka í størsta álvara.

## Saman standa vit sterkari

Summarið er komið í Føroyum, og hóast sólin skínur, og vit leita niðan í fjøllini at ganga túrar, so uppliva vit brádliga eisini kava í somu fjøllum og ein kulda, sum vit ikki skilja hesa ársins tíð. Gosfjøll goysa øsku út í loftrúmið, og vit mugu setast aftur og fáa einki gjørt. Vit eru uppi ímóti nøkrum, sum er so nógv størri enn vit. Kanska kunnu vit broyta veðurlagið við umhugsni og skynsemi, men tað krevur nýhugsan. Soleiðis er fakfelagsarbeiði eisini. Vit eru til tíðir uppi ímóti stórum og fløktum viðurskiftum, sum torfør eru at skilja. Tá er umráðandi ikki at steðga á og lata standa til. Hóast tað kann tykjast nyttuleyst eina løtu, so ber til at finna styrki í samfelag við onnur og harvið vinna á mál. Kanska er tað júst hetta, sum er so sera spennandi við hesum arbeiði.

Við vón um eitt gott summar heilsi eg tykkum øllum.


Betri at hava gott í væntu
Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.
Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.
Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.
Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti. Meiri fæst at vita á telefon 345 700 ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo.
betri.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari
Betri pensjón

# NEVND



**Maud Wang Hansen**
forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Elin N. W. Tausen**
skrivari
elin@pedagogfelag.fo



**Jórun Ennistíg**
nevndarlimur



**Guðrun Eysturlíð**
nevndarlimur
gudrun@pedagogfelag.fo

# UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin Hammershaimb Thomsen**
Fyrisitingarleiðari
katrin@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

# Tíðindi frá felagnum

## Summarfrí

Pedagogfelagið ynskir øllum eitt gott summar. Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 21. juli til 15. august.



## Sáttmálin uppsagdur

1 ára sáttmálin við Fíggjarmálaráðið og KAF (Kommunala Arbeiðsgevarafelagið) er uppsagdur at fara úr gildi tann 1. okt. 2011.
Fyrsti fundurin millum sáttmálapartarnar var í Fíggjarmálaráðnum tann 24. mai.



## Nýtt starvsfólk í felagnum:

Felagið hevur sett Katrin Poulsen í starv fyri Báru Guttesen, sum fer í barnsburðarfarloyvi

**Katrin Poulsen** er 33 ára gomul.
Hon er útbúgvin sosialráðgevi frá Den Sociale Højskole i København (2004).
MSc in Human Resource Management frá Lincoln University (2010).

Katrin hevur arbeitt á familjudeild í Gladsaxe og í Pædagogisk Psykologisk Rådgeving í Nuuk.

## **Temadagur** fyri tænastumenn 21. juni

Felagið skipar saman við Almannaráðnum og lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum fyri temadegi fyri teir limir, sum eru settir tænastumenn á serøkinum.

Hesin temadagur er ikki fyri „P.76'ararnar" – t.e. pedagogarnar við donskum tænastumannarættindum, ið høvdu eina setan, áðrenn fyrsti føroyski sáttmálin varð gjørdur fyri pedagogarnar í Føroyum.

Tað hevur verið eitt ynski frá tænastumonnunum at fáa meira at vita um teirra rættindi og skyldur sum tænastumenn og upplýsingar um teirra tænastumannaeftirløn.

Heri Joensen frá Almannaráðnum saman við Bjarna Mortensen frá lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum fara at greiða frá. Síðan fáa tænastumenninir høvi at seta spurningar.

Temadagurin verður á parnassinum á Hotel Hafnia 21.juni kl.13-16

Vinarliga boðað felagnum frá luttøku við at senda felagnum ein teldupost á pedagog@pedagogfelag.fo

## Felagið hittir nýggju pedagogarnar



Felagið hevur boðið nýútbúnu pedagogunum í felagshølini í Tungugøtu 1 tann 16. juni kl.17. Aftaná verður farið á Hotel Hafnia, har felagið fer at kunna teir um teirra lima- og sáttmálaviðurskifti aftur við einum góðum bita.

# Spurningar í sambandi við frítíð

Nú nærkast summarfrítíðin. Í flestu førum eru eingir trupulleikar í sambandi við, at frítíðin skal haldast, men nakrir ivaspurningar vísa seg tó at vera afturvendandi, sum t.d.

### Hvør tekur avgerð um, nær frítíðin skal haldast

Sambært frítíðarlógini er tað arbeiðsgevarin, sum í samráð við løntakaran ásetur, nær frítíðin skal haldast.

Tó er ásett í lógini, at minst 24 dagar, t.e. 4 vikur, av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðarskeiðinum 2. mai - 30. september.

Rættur arbeiðsgevarans at taka endaliga støðu til, nær summarfrítíðin skal takast, merkir eisini, at um arbeiðsplássið steingir ávísa tíð, hevur løntakarin skyldu til at taka summarfrítíðina hetta tíðarskeiðið, alt undir tí fyritreyt, at 24 daga t.e. 4 viku reglan, sum nevnd frammanfyri, verður hildin.

### Rættur til summarfrí

Frítíðarárið verður roknað frá 1.apr.-31. mars

Sjálvt um limur ikki hevur uppvunnið sær rætt til frítíð við løn, hevur limur tó altíð rætt til 5 vikur summarfrí – hin spurningurin er so, hvussu nógva løn ein hevur rætt til í summarfrítíðini.

Uppvunnir verða 2,5 dagar frítíð við løn fyri hvønn mánað ein hevur arbeitt. T.v.s., at er ein limur t.d. komin í starv 1. jan. 2010, hevur viðkomandi rætt til løn í 7,5 dagar, t.e. 2,5 dagar fyri januar + februar + mars, eftirsum frítíðarárið skiftir 31.mars

Sambært frítíðarlógini er frítíðin 30 dagar – t.v.s. 6 dagar x 5 vikur.

Frítíðin verður smb. Frítíðarlógina roknað frá mánadag til og við leygardag.

### Hvat hendir, um løntakari gerst sjúkur, áðrenn hann skal byrja summarfrítíð sína

Um løntakari gerst sjúkur og boðar arbeiðsgevaranum frá hesum, áðrenn summarfrítíðin skal haldast, so verður summarfrítíðin útsett, so leingi viðkomandi er sjúkrameldaður.

Um talan er um arbeiðspláss, sum steingir í summarfrítíðini, og løntakari gerst sjúkur, áðrenn summarfrítíðin skal byrja og sjúkrameldaður, so byrjar summarfrítíðin hjá viðkomandi ikki, fyrr enn viðkomandi er frískur aftur.

### Hvat hendir, um løntakari gerst sjúkur í summarfrítíðini

Um løntakari gerst sjúkur í summarfrítíðini, hevur ein ikki rætt til eyka summarfrítíð.

Undir serligum umstøðum kann løntakari søkja um at fáa frítíðina góðgjørda frá arbeiðsgevaranum.

### Hvussu er rættarstøðan, tá løntakari verður sagdur úr starvi:

Í Frítíðarlógini § 8 er ásett, at um løntakari verður uppsagdur, so má uppsparda frítíðin ikki leggjast inn í uppsagnartíðina. Tað merkir, at uppsagnarfreistin skal leingjast samsvarandi.

### Serstakir frídagar samb. ásetingar í sáttmálunum:

Um serstakir frídagar, so sum Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudagur ella aðrir fastir frídagar liggja í summarfrítíðini, eigur løntakari hesar dagar afturat frítíðini, tó ikki, um hesir dagar fella á ein sunnudag.

### Eyka frívikan

Serstaka frívikan er ein serlig avtala. Hesir dagar eru ikki tengdir at Frítíðarlógini.

Avtaluna finna tit á heimasíðuni undir "Sáttmálar" / avtala um serstaka fríviku.

## Góðu limir!

Minnist til at boða felagnum frá, um tú broytir telefonnummar, teldupost ella starvsviðurskiftini eru broytt – um tú fer úr starvi ella fer í annað starv.

# Felagið skipar fyri skeiði fyri allar limir um **truplu samrøðuna**



*Bergtóra Høgnadóttir Joensen*



*Jóhanna Andreasen*

*Allir limir felagsins hava nú møguleika at koma á skeið um truplu samrøðuna. Endamálið við skeiðinum er at gera luttakararnar betur førar fyri bæði at halda og vera við til truplar samrøður.*

Á skeiðinum viðgera vit millum annað hesar spurningar:

- **Hví eigi eg at vera fyrireikað til truplu samrøðuna?**
- **Nær er ein samrøða trupul?**
- **Hvussu geri eg, tá samrøðan er trupul?**
- **Ósemjur? Hvussu trappi eg konfliktina niður heldur enn upp?**

Á skeiðinum verða bæði teoretisk upplegg, venjingar og smærri uppgávur.

Jóhanna Andreasen og Bergóra Høgnadóttir Joensen eru skeiðhaldarar. Jóhanna er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, og Bergtóra er sosialráðgevi. Harumframt hava tær báðar viðkomandi eftirútbúgvingar.

Skeiðhaldararnir halda javnan skeið um samskifti og annars tað, sum snýr seg um trivnaðin á arbeiðsplássinum.

**Nær:** Skeiðið verður 9. september frá kl. 9.00 til 15.30. Harumframt verður uppfylging ½ dag tann 23. september.

**Hvar:** Í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9, 100 Tórshavn

**Kostnaður:** kr. 1.400,00 skal flytast á konto 9181 – 120.094.3 áðrenn skeiðið byrjar.

***Tilmelding:*** *fer fram við at senda teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo ella ringja til Pedagogfelagið 357576. Minst til at viðmerkja navn, bústað, fartelefon-nummar og arbeiðspláss. Seinasta freist at tekna seg er 25.08.2011.*



# Aðalfundurin 2011 stóð í ljósinum av mannarættinda-sáttmálunum

*Almennu Føroyar hava tikið undir við Barnarættindasáttmálanum og við ST-sáttmálanum fyri fólk, sum bera brek. Í 2011 vóru Føroyar til próvtøku hjá ST-dómstólinum, har vit ikki fingu serliga góðan karakter, so her er nógv at arbeiða við.*

*Aðalreglurnar í hesum sáttmálum eru, at almennu Føroyar viðurkenna, at øll menniskju hava virðing og tign uppiborna, og at hvørt mansbarn eigur full og ómissandi rættindi, og tað er grundarlagið undir frælsi, rættvísi og friði í heiminum.*

*Hetta eru stórar yvirskriftir og sera viðkomandi, tá vit hugsa um pedagogiska arbeiðið og ta stóru ábyrgd, vit dagliga hava í møtinum við menniskju við serligum tørvi og børnum sum heild.*



*Páll Nielsen orðstýrari á aðalfundinum*




*Heini Lützen greiðir frá samlagstryggingini*

# **Gestarøðarar** á aðalfundinum



*Hildur Patursson, master of deucation, hugleiddi á aðalfundinum um rættin til tann góða barnagarðin*

**Hildur Patursson** hugleiddi á aðalfundinum há Føroya Pedagogfelag um rættin til tann góða barnagarðin – har børn eru ein týðandi part av lívinum. Hon nevndi, at barndómurin er nakað í sær sjálvum, og at vit ikki eiga at síggja børn sum nøkur, ið alla tíðina eru á veg til at blíva nakað annað.

ST-barnarættindasáttmálin sigur, at børn hava virði í sær sjálvum. Børn hava rætt til at verða hoyrd og vird. Børn eru ein týðandi partur av demokratiska samfelagnum.



*Rógvi Thomsen, cand. ped., hugleiddi um ST-sáttmálan yvir fólk, ið bera brek*

**Rógvi Thomsen** hugleiddi um ST-sáttmálan fyri fólk, sum bera brek. Hann sigur m.a., at pedagogar umboða áhugamálini hjá børnum og teimum, ið bera brek.

Tolsemi er at viðurkenna ymiskleika og ikki at krevja, at øll eru eins. Frælsi at liva sum einstaklingur letur seg bert gera í samfelag við onnur, og uppgávan hjá demokratiska samfelagnum er at skapa karmar. Raðfestingar og sparingar, har alt verður skorið yvir ein kamb, har tunlar og menniskju hava sama virði, er ein avleiðing av eini kassatólshugsan um, at tól og menniskju eru líka. Við tílíkari hugsan eru tað fíggjarligu heldur enn menniskjansligu virðini, ið vinna, tá vit ikki hava ráð.

Pedagogiska arbeiðið er at stuðla fólki, ið bera brek, og at hjálpa teimum við at skapa meining í egnum lívi.

*Aftaná gestarøðararnar varð aðalfundurin settur av forkvinnuni Maud Wang Hansen.*

*Í síni formansrøðu hugleiddi hon um sítt fyrsta ár sum forkvinna í felagnum og greiddi m.a. frá teimum limatiltøkum, ið hava verið farna ári, um tey mál, arbeitt hevur verið við, frá samráðingunum í heyst og tók at enda í, at felagið næsta ár verður 30 ár, og at ætlanin er at brúka hetta høvi at varpa ljós á námsfrøðisliga fakið, og eru ætlanir um at hátíðarhalda hetta við at bjóða øllum limum til ein námsfrøðiligan fagnað við fakligum, áhugaverdum, kveikjandi og læruríkum fyrilestrum, verkstovum og upplivingum.*

*Síðani framlegði grannskoðari felagsins, Bjarni Arnason, roknskapin fyri 2010, og Heini Lützen frá LÍV greiddi frá samlagstryggingini hjá limunum, og eftir tað legði nevndin fram og greiddi frá virkisætlanini fyri komandi ár.*

**Virkisætlanin í høvuðsheitum:**

| **Limafundir** | **Blað og miðlar** |
|---|---|
| Evnisdagar | Miðlafólk |
| Kjakfundir | Temabløð |
| | Heimasíðan |
| **Álitisfólk** | **Fakfelagssamstarv** |
| Regluligar fundir | Regluligar fundir |
| Álitisfólkamappu | Skeið |
| | Samráðingar |
| **Leiðararáðið** | **Sáttmálsamráðingar** |
| Reguligar fundir | Felagssamráðingar |
| Leiðaradagur apr./mai | Sersamráðingar |
| Landsleiðaradagur | Nýggjan sáttmála 1.okt. |
| **Námsfrøðingaráð** | **Norrønt samstarv** |
| | NLS – dagstovna- og skúlaøkið |
| | NFFS – Sosialpolitiska økið |
| **Hjálparfólkaráð** | **30 ára hald 2012** |
| | |
| **Skeið** | **Løgtingsvalið 2012** |
| Allir limir | |
| Álitisfólk | |
| Leiðarar | |
| **Útbúgving** | **Eftirløn** |
| Bachelor/námsfrøðingar | Samla allar eftirlønir á einum stað. |
| Hjálparfólk | |









*Drúgv viðgerð varð av uppskotum til lógarbroytingar, sum lógarbólkurin – settur av nevndini – hevði fyrireikað.*

Síðani varð farið undir viðgerð av drúgvum lógarbroytinum eftir uppskoti frá nevndini. Hetta vóru lógarbroytingar, sum lógarbólkurin hevði fyrireikað.

Summi av uppskotunum vórðu samtykt, meðan onnur ikki fingu neyðugu undirtøkuna fyri at verða samtykt, tá minst 2/3 av avgreiddum atkvøðum skulu vera fyri lógarbroytingum.

Uppskotini um broytingar av limaskyldum, brot á limaskyldur, broyttari limauppmøting fyri at kunna viðgera lógarbroytingar, broyttum limatali fyri at kalla inn til eykaaðalfundar, broyttari freist fyri, nær aðalfundurin kann haldast, reglum fyri nevndarvirksemi, at formaður og nevndarlimir nú ístaðin verða vald fyri 3 ár vórðu samtykt, meðan uppskotini um broyting av mannagongdum og reglum viðv. Brævatkvøðugreiðslu og reglum um afturval av formanni ikki vórðu samtykt.

Sí uppkotini til lógarbroytingar í seinasta Pedagogblað, har uppskotini til lógarbroytingar undir atkvøðugreiðslu 1, 3, 5, 6 vórðu samtykt, meðan uppskotini undir atkvøðugreiðslu 2 og 4 ikki vórðu samtykt.



***Fremra rað:** Maud W. Hansen, forkvinna, Jannie S. Jacobsen, eykalimur, Elin N. W. Tausen, nevndarlimur.*
***Aftara rað:** Maria Dahl, eykalimur, Sóley Samuelsen, eykalimur, Jógvan Philbrow, nevndarlimur og Jórun Ennistíg, nevndarlimur.*

## Nývalda nevndin og eykalimir

Í ár skuldu 3 nevndarlimir veljast – tveir nevndarlimir fyri eitt 2 ára skeið og ein nevndarlim fyri 1 ár, tá Jan Mølvad Laursen, ið varð valdur í nevndina á seinasta aðalfundi, segði seg úr nevndini í januar í ár.

Av teimum nevndarlimum, ið stóðu fyri vali hesaferð, var tað bert Jógvan Philbrow, ið tók við afturvali.

Umframt hetta stillaðu 3 onnur valevni upp til nevndarvalið.

Vald vórðu Elin N. W. Tausen, Guðrun Eysturlíð fyri 2 ár og Jógvan Philbrow fyri 1 ár. – Elin N. W. Tausen hevur sitið í nevndini sum eykalimur fyri Jan Mølvad Laursen síðan sept. 2010 meðan Guðrun Eysturlíð er nýggjur nevndarlimur.

Til eykalimir vórðu vald: Jannie S. Jacobsen, hjálparfólk og Maria Dahl og Sóleyð Samuelsen, ið báðar eru pedagogar.

## Val av internum grannskoðarum

Val var av internum grannskoðarum. Vera Bjørgvin tók við afturvali, meðan Maibritt Simonsen ikki stillaði upp aftur sum grannskoðari.

Til internar grannskoðarar varð Vera Bjørgvin afturvald, og Mirjam Johannesen varð nývald.













# Forkvinnan tekur samanum

Aðalfundurin nam annars við evni sum talufrælsi, rættin til at verða í fakfelag og tey grundleggjandi rættindi, sum fylgja við tí at liva í einum demokratiskum samfelag.

Sum forkvinna er tað ein frøi at uppliva so engageraðar og luttakandi limir. Hóast lógarbroytingar kunnu tykjast sera drúgvar, so rukku vit viðtøku av helvtini av teim framløgdu uppskotunum. Nevndin fekk tveir nýggjar nevndarlimir, og fari eg at bjóða tykkum og nýggju tiltakslimunum vælkomnum. Takk fyri til tykkum, sum stillaðu upp, og til tykkum, sum fóru úr nevndini.







Aftan á fundin var farið til borðs, har borðreitt var við øllum góðum. Sangur frá fleiri „standandi“ limum og undirhald við Riu og Súsonnu Torgarð setti veruliga lív í. Aftaná var tónleikur við bólkinum „Vit og skil“, og dúgliga varð dansað til út á náttina.

Stóra uppmøtingin og luttøkan í kjakinum vísir, at limirnir í Føroya Pedagogfelag eru áhugaðir í sínum fakfelag og í at bera felagið framá móti betri viðurskiftum á øllum økjum. Takk fyri tað, og vónandi koma tit aftur næsta ár.

# FELAGSINS AKTIÓNS- OG UPPLÝSINGAR-GRUNNUR:

*Føroya Pedagogfelag hevur ein grunn, nevndan „Aktións- og upplýsingar-grunnurin. „Sambært reglugerðini fyri grunnin er endamálið við grunninum“ at stuðla limum felagsins undir aktión/verkfalli. Harumframt at granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.“*

## Mannagongd fyri at søkja um stuðul úr A&U grunninum:

### Hvør kann søkja um stuðul úr grunninum?

Limir í Føroya Pedagogfelag kunnu søkja um stuðul úr A&U grunninum.

Hvat virksemi kann vera stuðlað úr A&U grunninum?

Virksemi, sum er við til granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

### Nær kann søkjast úr grunninum?

Søkjast kann 4 ferðir um árið, 1. mars, 1. juni, 1. sept. og 1. des. Nevndin hittist fyrsta mánadag eftir, at umsóknarfreistin er farin. Umsøkjararnir fáa svar upp á umsóknina umleið hálvan í tí mánaðinum, søkt verður í.

### Hvussu søkir man úr grunninum?

Umsóknin skal stílast til A&U grunnin, Føroya Predagogfelag, postmoga 318, 110 Tórshavn.

Í umsóknini skal vera ein nágreinilig frágreiðing um, hvat verður søkt stuðul til, og ein kostnaðarmeting skal vera løgd við

Nevndin fyri A&U grunnin kann áseta ávísar treytir fyri at veita stuðul úr grunninum.

### Nevndin fyri A&U grunnin:

Nevndin er mannað við 3 limum. Einum nevndarlimi, sum nevndin í Føroya Pedagogfelag velur, einum álitisfólki frá dagstovnaøkinum og einum álitisfólki frá serøkinum, sum álitisfólkini velja. Í nevndini eru: Elin N. W. Tausen, nevndarlimur, Rikke Bak Sørensen, álitisfólk, Fríða Lómstein, álitisfólk. Nevndarlimirnir sita fyri eitt ár í senn. Álitisfólkini velja síni umboð til nevndina fyri grunnin á fyrsta álitisfólkafundi eftir aðalfundin.

# LÍV selt til Bank Nordik

*Loksins er sølan av LÍV avgreidd. – Vinnumálaráðið hevur nú loksins tikið støðu til søluna av LÍV. Bank Nordik eigur nú helvtina av LÍV saman við Ognarfelag Tryggingartakara, ið eigur hina helvtina.*

Ognarviðurskiftini í LÍV hava hingið í leysum lofti líka síðani í 2000, tá Føroya Løgting staðfesti við lóg, at landið átti Føroya Lívstrygging. Nógv skiftandi landsstýrisfólk hava í hesi 10 árini tosað og havt ætlanir við lívstryggingarfelagnum uttan nakað endaligt úrslit. Fakfeløgini, ið hava sáttmálar fyri sínar limir í LÍV, hava øll hesi árini bíðað eftir eini støðutakan.

Í skrivandi løtu bíða fakfeløgini eftir fundarboðum frá nýggju eigarunum um teirra ætlanir og teirra framtíðarsamstarv við Ognarfelagið hjá tryggingartakarunum, ið eigur hina helvtina av LÍV.

### Eftir er so at bíða eftir eftirlønarreforminum.

Eftirlønarreformurin skuldi leggjast fyri Føroya Løgting og koma í gildi 1. jan. 2010 – síðan varð tað útsett til 1. jan. 2011 og síðan enn einaferð til 1. jan. 2012, men útlitini fyri, at hetta kemur at halda, eru ikki bjørt. Tað frættist, at møguliga bert partar av reforminum verða samtyktir og settir í gildi í 2012.
Felagið hevur saman við Fakfelagssamstarvinum verið á fundi við trivnaðarnevnd Føroya Løgtings og har greitt trivnaðarnevndini frá teimum skrivligu viðmerkingum, ið Føroya Pedagogfelag saman við øðrum fakfeløgunum og Fakfelagssamstarvinum hava sent teimum.

Fakfelagssamstarvið framførdi eisini yvirfyri trivnaðarnevndini, at reformurin, sum er, ikki er búgvin at verða samtyktur av løgtinginum. Fakfeløgini vilja sjálvsagt tryggja sær, at hædd verður tikið fyri teimum viðmerkingum, sum fakfeløgini eru komin við.




# Innbúgv til fyritøkur og stovnar

- Skúlin við Løgmannabreyt
- Føroya Læraraskúli
- Dagstovnurin á Flatinum

SENDISTOVAN

Innbúgv | Postboks 109 | 110 Tórshavn | 347 347 | samband@nema.fo | www.nema.fo

NEMA

# **Leiðararáðið** afturvalt



**Fremra rað:** *Poula Eidesgaard, Nancy Poulsen, Joan Midjord*
**Aftara rað:** *Mirjam Johannesen og Marjun Hentze*

*Leiðarafundur var 11. mai 2011, har somu umboð vórðu afturvald í leiðararáðið.*

## Ársfrágreiðing fyri seinasta árið

Góðu leiðarar og Føroya Pedagogfelag.

Leiðararáðið hevur nú virkað í tvey ár. Hetta er annað árið, Føroya Pedagogfelag skipar fyri einum felags leiðaradegi, har allir leiðarar kring landið hava høvi at hittast og at velja limir í eitt nýtt leiðararáð.

Tað tekur tíð at venja seg við eitt nýtt tiltak og teir møguleikar hetta hevur, soleiðis er eisini við Leiðararáðnum. Vit kunnu ásanna eftir hesi tvey árini, at tað er brúk fyri einum leiðararáð.

Eftir seinasta leiðaradag byrjaðu vit at fyrireika landsleiðarastevnuna, sum er eitt av endamálunum hjá leiðararáðnum.

Endamálið við hesi landsleiðarastevnu er at fáa fakligan íblástur og at skifta orð við aðrar leiðarar um ymisk viðurskiftir, ið viðkoma okkum.

Vit valdu at varpa ljós á námsfrøðiliga leiðslu, og til hetta høvdu vit fingið Damiella Checcin úr Danmark, sum helt fyrilestur um námsfrøðiliga leiðslu. Johanna á Bergi greiddi frá, hvat íð rørir seg á leiðsluøkinum við einum fyrilestri, sum hon kallaði Viljin er sterkasta svørði, vónin er bjartasti brandur. Maud W. Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum, helt ein sera viðkomandi fyrilestur um at vera leiðari á fleiri pallum.

Um kvøldið var døgurði við undirhaldi.

Tað vóru 78 leiðarar til leiðaradagin umframt Leiðararáðið og umboð fyri Pedagogfelagið.

*Tað vóru 78 leiðarar til leiðaradagin umframt Leiðararáðið og umboð fyri Pedagogfelagið.*

Eftirmetingin, sum vit hava fingið, hevur verið góð. Tað er altið okkurt, ið kann gerast betur til næstu ferð, og tí er eitt uppskot at hava eitt eftirmetingarskjal við til næstu ferð.

Royndirnar siga okkum, at best er at hava leiðaradagin í september ella fyrst í oktober.

Vit hava fingið nakrar fyrispurningar á telefonini.

Fyrispurningarnir er um viðurskifti, har vit hava tosað og vegleitt leiðarar, hvussu tú fyrisitur sambært fyrisetingarlógini. Hin ráðgevingin er at lurta og vegleiða, hvat tú gert sum leiðari, tá ið trupulleikar stinga seg upp á einum stovni.

Sambært teimum, sum hava ringt, hjálpir tað at seta orð á tað, sum tú situr einsamallur við. Lat ikki tað at hava ein trupulleika blíva til ein trupulleika, tí so hevur tú tveir trupulleikar.

Tí vilja vit heita á tykkum um at brúka telefonina. Lat ongan spurning halda tykkum aftur.

Telefonin er opin frá kl. 9.00 - 16.00 mánadag til fríggjadag, telefonnummarið er 287574, øll eru vælkomin at ringja. Um vit ikki svara beinavegin, tá sendi ein sms, og vit venda aftur til tykkum.

Endamálið við ráðgevingini er at veita hjálp og ráðgeving, ivast ikki í at brúka telefonina. Hon er okkara linja til at fáa ráðgeving, tá ið á stendur.

Vit hava fingið nøkur skriv frá leiðarum.

Í einum skrivi verður víst á misnøgd í sambandi við svar frá felagnum, tá spurt verður um møguligt undantaksloyvi í møguligum verkfalli.

Leiðaráðið hevur gjørt vart við hetta skriv og metir tað vera óheppið, at alt samskifti í hesum føri gongur gjøgnum álitisfólkið, og leiðarar tí føla seg tilsíðusettar.

Ein áheitan er komin frá leiðarum í sambandi við, at nógv kjak hevur verið í miðlunum um, at børn skulu eitt ár fyrr í skúla, um at varpa ljós á, hvørja ávirka tað hevur á børnini og økið sum heild.

Vit kunnu vísa á, at í mars var pallborðsfundur í Miðlahúsinum, har tvey umboð fyri Pedagogfelagið, Maud W. Hansen og Jógvan Philbrow, luttóku saman við limum frá Føroya Lærarafelag, har tey umrøddu skiftið millum barnagarð og skúla og hugsanir um, nær børn skulu í skúla.

Mentamálaráðið skipaði fyri einari ráðstevnu um hetta sama evnið í mai mánaði í fjør.

Pedagogfelagið fer í næstum at geva eitt temablað út um hetta sama evni.

Eisini hevur ein bólkur av leiðarum í Tórshavnar kommunu havt ein temadag um hetta evnið, har hvør stovnur hevur lagt fram tað, ið tey hava at bjóða seks ára gomlum. Ein grein stóð um temadagin í bløðunum og í Pedagogblaðnum.

Leiðaráðið hevur eisini fingið uppskot um námsfrøðiligt stevnumið til hoyringar, og hava vit gjørt viðmerkingar til tað.

Vit hava eisini havt uppskot til løgtingslóg um broytingar í lógtingslóg um dagstovnar og dagrøkt til ummælis.

Her varð skotið upp at broyta dagstovnalógina við atliti at kunna hava felags leiðslu fyri dagstovn og dagrøkt.

Leiðararáðið varð kunnað um, at Pedagogfelagið fór at gera viðmerking til uppskotið, og tóku vit undir við viðmerkingum felagsins.

Leiðararáðið hevur tíggju fundir um árið. Av hesum eru fýra fundir við nevndina í Pedagogfelagnum. Tað eru settir fastir fundir á til komandi ár.

Endamálið við hesum fundum er at lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum.

Á síðsta fundi við felagið var sett tíð av til at tosa um, hvørjar vónir vit hava til felagið og tey til okkum, tí hetta var ógreitt frá báðum síðum.

Orsøkin er, at nógv rørir seg á økinum, og skjótt er, at tíðin fer við at venda ov nógvum evnum, tá íð vit hittast. Vit hava bert fýra fundir um árið.

Vit eru samd um, at fundirnir skulu snúgva seg um samstarvsuppgávur, og at vit hava eina skrá, sum verður send út í góðari tíð undan fundinum, har vit og felagið hava ynskir til skránna.

Vit hava á fundi við nevnd felagsins tosað um týdningin av, at hús felagsins kennist opið fyri limirnar, og at nevndin hevur tikið tað til eftirtektar, eins og vit hava borið boðini/undranina víðari viðvíkjandi, hví álitisfólkaskeiðini eru so dýr, ella hví stovnarnir skulu bera hendan kostnaðin.

Vit vóru í Danmark á einari sera áhugaverdari ráðstevnu um leiðslu í november mánaði.

Vit mugu vita, hvat hendir á leiðsluøkinum kring okkum, og tí er tað viðkomandi hjá leiðararáðnum at vera við, tá ið stórar ráðstevnur verða hildnar í Danmark.

Vit hava eina grein frá hesi vitjanini í Pedagogblaðnum, har vit hava ymiskt áhugavert og hugskot frá ráðstevnuni.

Vit vilja at enda takka fyri eitt spennandi ár í leiðararáðnum og takka Pedagogfelagnum fyri samstarvið, og vilja vit heita á tykkum einaferð enn um at brúka leiðararáðið, skriva til okkum ella ringið.

*Vinaliga Leiðararáðið*

*Vit vilja at enda takka fyri eitt spennandi ár í leiðararáðnum og takka Pedagogfelagnum fyri samstarvið*

# Leiðararáðið

## Endamálið er:

- At lýsa støðuna og møguliga tørvin hjá stovnum og leiðarum yvirfyri nevndini.
- At koma við uppskotum um, hvussu nevndin og leiðarar í felag kunnu lyfta økið, bæði fakliga og fyrisitingarliga.

## Arbeiðsuppgávurnar eru:

- At bjóða ráðgeving til leiðarar.
- At savna og samskipa uppskot til nevndina, til dømis til sáttmálasamráðingar, leiðaraprofil og annað.
- At bjóða hjásitara.
- At skipa fyri árliga Landsleiðaradegnum.
- Fyri at vita, hvat rørir seg millum leiðarar, er tað av týdningi, at vit hoyra frá tykkum.

*Tlf. nr er: 28 75 74*
*Telefonin er opin frá kl.9.00-16.00 gerandisdegar.*
*Um vit ikki svara, vinaliga send eini sms boð, og vit venda aftur til tín.*



Jógvan Philbrow var hugtikin av tí, sum børnini í frítíðarskúlanum í Trongisvági, høvdu fingið burtur úr at vitja í fjørðuni

Myndir: Tórfinn Smith

# Stovnsvitjanir og limafundir saman við LÍV

Felagið hevur saman við LÍV skipað fyri limafundum kring landið, har vit hava umrøtt tryggingarviðurskifti og sáttmálasamráðingar.

Fundir vórðu hildnir í Leirvík, Miðvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn. Tað var ymiskt, hvussu uppmøtingin var, men nakrir av fundunum vóru væl vitjaðir, og gott kjak stóðst burturúr, eins og viðkomandi spurningar vórðu settir og svaraðir.

Í sambandi við fundin á Tvøroyri vitjaði nevndin fleiri dagstovnar í Suðuroynni sama dag. M.a. barnagarðin og frítíðarskúlan á Tvøroyri, barnagarðin í Vági og verkstaðin á Bakka í Vági. Vit vórðu sera væl móttikin alla staðni og møttu blíðum og vælmotiveraðum limum, eins og vit fingu gott innlit í viðurskiftini á ymisku stovnunum.



Felagið vitjar frítíðarskúlan í Vági, har Søren Richardt er leiðari (næst uttast til høgru)



*Guðrun Petersen, leiðari á barnagarðinum Mýrufípuni í Trongisvági, greiðir nevndarlimum frá*



*Vitjað varð eisini á varda verkstaðnum á Bakka í Vági, har leiðarin, Joan Nolsøe, greiddi frá*

## Trivnaðarkanningin

Trivnaðarkanningin á dagstovnaøkinum er løgd fram á tveimum limafundum, einum í Tórshavn og einum í Klaksvík, umframt einum álitisfólkafundi í Tórshavn.

Til framløguna í Tórshavn var tað Karin Jóhanna Knudsen, frá Granskingardeplinum, sum legði fram, og lagt varð upp til gott kjak og umrøðu av tí týdningarmikla og góða arbeiðinum, sum starvsfólk dagligа gera.

Til fundin í Klaksvík stóðst eitt sindur av rumbli burtur úr einari grein, sum nevndin hevði í bløðunum beint undan fundinum.

Hetta førdi tó við sær, at politiska umboðanin á fundinum var sera góð.

Forkvinnan legði kanningina fram, og nógv og gott kjak var aftaná. Merkt av, at politikarar vóru við á fundinum, snúði kjakið seg í stóran mun um virðing fyri arbeiðinum, sparingar og tað góða arbeiðið.

Álitisfólkafundur og leiðarafundur vóru tann 11. mai.

Vónandi verða fleiri tílíkir fundir í hesum árinum.



*Annamaria Antoniussen tók ímóti nevndini*

# Álitisfólkaskipanin munandi ment



*Jórun Ennistíg, nevndarlimur*

*– Týdningurin hjá felagnum at hava álitisfólk er sera stórur. Álitisfólk eru felagsins forlongdi armur at tryggja, at sáttmáli og felagsins lógir verða fylgdar. Týdningurin er ikki minni fyri limirnar, sum álitisfólkini eru talsmaður hjá. Tey hava, saman við leiðsluni, eisini ábyrgdina av, at limir verða væl kunnaðir og tiknir við upp á ráð í málum, sum viðvíkja arbeiðsplássinum.*

*– og áhugin fyri at gerast álitisfólk er av somu orsøk eisini øktur, sigur Jórun Ennistíg, sum í nevndini hevur álitisfólkaskipanina sum sítt ábyrgdarøki*

Jórun Ennistíg arbeiðir sum hjálparfólk í býlingshúsinum Inni á Gøtu í Hoyvík og er eisini nevndarlimur í Pedagogfelagnum. Hon hevur verið álitisfólk á sínum arbeiðsplássi í nøkur ár og hevur í nevndini fingið tillutað álitisfólkaskipanina sum sítt ábyrgdarøki.

Arbeiðið sum nevndarlimur er rættiliga tíðarkrevjandi. Sum vera man er alneyðugt at fylgja væl við samfelagsliga og hvat hendir á pedagogiska økinum, bæði her hjá okkum og uttanlands, og harafturat kann til tíðir vera rættiliga stórt fundarvirksemi. Nevndarlimir hava rætt til at fáa frí frá arbeiðinum við løn ein dag hvønn mánað, og er talan um fleiri fundir, verður tað við lønarmissi. Nevndin hevur vanliga tveir fundir hvønn mánað, og harafturat koma aðrir fundir, m.a. í ymiskum arbeiðsbólkum. Men at fáa frí frá arbeiðsplássinum hevur Jórun ikki nakrar trupulleikar av. Sama vælvilja vístu eisini bæði leiðsla og starvsfólk annars í sambandi við álitisfólkaarbeiðið.

## Álitisfólkaarbeiði munandi broytt

Sum álitisfólk var Jórun í bólki saman við fleiri øðrum álitisfólkum á øðrum stovnum. Nógv tey flestu vóru hjálparfólk. Tað at vera álitisfólk tóktist ikki hava tann stóra áhugan hjá pedagogum, men nú er vent í holuni. Stórur partur av álitisfólkunum eru nú pedagogar, og álitisfólkabólkar eru vorðnir munandi virknari, og álitisfólkaarbeiðið munandi sjónligari. Jórun heldur, at avtalan, tey gjørdu í sambandi við seinastu sáttmálasamráðingarnar, at álitisfólk skuldu fáa tríggja mánaða longri uppsagnartíð, var eitt stórt framstig og sigur ikki so lítið um týdningin og ábyrgdina av at vera álitisfólk. Við størri tryggleika í álitisfólkastarvinum gjørdist eisini áhugin størri.

*Stórur partur av álitisfólkunum eru nú pedagogar, og álitisfólkabólkar eru vorðnir munandi virknari, og álitisfólkaarbeiðið munandi sjónligari*

## Gott amboð

Nevndin leggur stóran dent á alla tíðina at menna álitisfólkaskipanina, og til tess ikki minst at hava vælvirkandi álitisfólkabólkar. Í tí sambandi arbeiðir Jórun m.a. við at gera eina sonevnda álitisfólkamappu við øllum viðkomandi skjølum, lógum og reglugerðum, sum alla tíðina verður dagførd. Hetta er eitt gott amboð hjá øllum starvsfólkunum á bú- og dagstovnum.

Millum uppgávurnar hjá álitisfólkabólkunum er at menna sjálva álitisfólkaskipanina, at fáa eitt neyvari samstarv millum álitisfólk, starvsfólk og nevnd, og at miða eftir at loysa møguligar trupulleikar á staðnum. Við vælvirkandi álitisfólkabólkum er eisini lættari hjá nevndini at fylgja við, hvat hendir úti á teimum ymisku stovnunum.

Jórun sigur, at stórt ynski hjá álitisfólkum er at fáa førleikamennandi møguleikar, og tað ger nevndin nakað við. M.a. skipar felagið fyri skeiði í heyst, sum tey nevna „Trupla samrøðan“. Harafturat skipar felagið eisini fyri skeiðum og øðrum felags tiltøkum fyri leiðarum og álitisfólkum.

# Arbeiði í **álitisfólkabólkum**

*Álitisfólk eru skipaði í álitisbólkar. Føroya Pedagogfelag hevur gjørt nakrar álitisfólkabólkar sum eru settir saman eftir einum geografiskum leisti og eftir, um álitisfólkið starvast á dagstovna- ella serøkinum.*

### Endamálið við álitisfólkabólkunum er:

- At styrkja álitisfólkaskipanina
- Tættari samstarv
- Loysa mál úti á økinum
- Lættari hjá felagnum at fylgja við, hvat rørist úti á stovnunum

Harafturat hevur Pedagogfelagið orðað, hvussu bólkarnir kunnu skipa seg, og orðað eina reglugerð, sum inniheldur fundarinnkalling, fundarætlan, fundarskrá, fundarviðgerð, tagnaðarskylda og fundarsið fyri fundirnar.

Pedagogfelagið hevur heitt á tveir bólkar frá ávikavist dagstovna- og serøkinum um at greiða frá, hvussu ein fundur kann vera, tá ið tey hittast, og hvørji evni verða viðgjørd.

Bólkurin, sum umboðar dagstovnaøkið, er mannaður við 8 álitisfólkum frá Býlingshúsunum í Havn, og tey greiða soleiðis frá.

# Dagstovnaøkið

*Vit eru 8 álitisfólk í bólkinum, og higartil er so at siga ongin útskifting farin fram.*

Vit hittast fýra ferðir um árið niðri á Hvonn. Hetta hava vit valt, tí tey flestu rúmini í barnagarðinum eru upptikin kl. 13.00, tá fundinir eru. Orsøkin til, at vit sita á Hvonn, er eisini hon, at tað er ringt at kobla av, tá vit sita í barnagarðinum. Børnini gráta o.s.fr., og tá hevur man ofta hug at renna frá fundinum. Man verður órógvaður ov nógv. Vit sita fyri okkum sjálvi í einum horni, har vit fáa prátað í friði.

Tað, at vit hittast úti av stovninum, verður væl sæð av hinum starvsfólkunum, tí tey duga væl at síggja allar fyrimunirnar við bólkinum og tí arbeiði hesin leggur eftir seg. Tað er eisini til gagns fyri tey.

Um so er, at vit koma til kort, kunnu vit vísa til heimasíðuna hjá Pedagogfelagnum.

Til hvønn fund hava vit valt evni, sum vit skulu umrøða og kjakast um. T.d. lønarstig, sáttmála, sjúkradagar hjá arbeiðsfólki og hjá børnunum, setanir, uppsagnir v.m.

Tað, sum er gott við bólkinum, er serliga góða netverkið ímillum okkum í bólkinum. Vit hava teldupost adressur, tlf. nr. etc. og kunnu altíð brúka hvørja aðra konstruktivt.

# Serøkið

*Hetta er ein álitisfólkabólkur innan serøkið, sum er mannaðum av álitisfólkum á sambýlum í Havn.*

## Tey greiða frá:

– Vit hittast 4 ferðir um árið, umleið 2-3 tímar hvørja ferð. Vit skiftast millum tey sambýli, har møguleiki er fyri tí. Eisini skiftast vit um at skipa fyri fundunum og keypa okkurt ábit.

– Vit taka ymisk evnir upp sum viðkoma okkara arbeiðsøki, so sum sáttmálan, arbeiðstíðarreglar, fyrisitingarlógina, tvørfakligt samstarv, arbeiðsumhvørvi, trygd og trivnað. Eisini taka vit mál upp, sum kunnu fylla nógv hjá álitisfólkinum. Tað kann t.d. vera samstarvið við leiðsluna, hvussu verður álitisfólkið brúkt / misbrúkt á stovninum o.s.fr.

Hetta er ein stabilur bólkur, og tí er ikki stór útskifting í bólkinum.

Vit halda, at tað er gott at kjakast um arbeiðsviðurskiftini hjá okkum, kunna hvønn annan um royndir okkara, geva hvørjum øðrum moralskan stuðul, um okkurt er, feedback, uppbakning, supervisión.

Eisini er tað gott, at felagið skipar fyri skeiðum í t.d. sáttmálanum, fyrisitingarlógini, tí truplu samrøðuni, tori skeiði o.s.fr.

Av vansum kann vera, at tað kann vera torført at samskipa ein fund, har øll kunnu møta,tí vit arbeiða í skiftivaktum.

– Vit halda, at ein kompensatión fyri at virka sum álitisfólk vildi verið upp á sítt pláss.

– Generelt kann sigast, at vit uppliva, at tey hava ikki stóran áhuga fyri hesum netverki. Um okkurt relevant er á skránni, siga vit teimum frá hesum til t.d. ein starvsfólkafund.

– Tað kann koma fyri, at tað kann tykjast at vera einsligt og at vera álitisfólk, og tí kann hetta forum vera sera gott og gevandi. Vit læra av hvørjum øðrum og siga hvørjum øðrum frá royndum okkara.




# Dagtilboð til fólk við autismu




*Frá vinstru: Bogi, Julianna, Torkil, Poulina, aftan fyri Torrey, Sjúrður heldur í Ingrid og Teitur*

Verkhúsið Stíggjur heldur til á Høgabóli í Saltangará og er eitt dagtilboð fyri vaksin fólk við menningartarni. Stovnurin er skipaður undir Nærverkinum og byrjaði sítt virksemi í 1993. Ymiskt er, hvussu førleikin hjá brúkarunum er, men felags fyri øll er, at tey megna ikki at hava eitt vanligt, sjálvstøðugt arbeiði.

Í september í fjør varð virksemið hjá Verkhúsinum víðkað við einum dagtilboð fyri fólk við autismu. Hetta varð gjørt, av tí at einki tílíkt tilboð var. Í dag luttaka fýra dreingir í dagtilboðinum. Ingrid Nord Olsen og Julianna Heimustovu, sum báðar eru námsfrøðingar, eru um teir. Tær taka lut í eini serligari útbúgving, sum Nærverkið hevur fingið í lag, og sum danski granskingarstovnurin fyri autismu stendur fyri.

## Hølisumstøður

Eg fái at vita, at dagtilboðið hevur fingið eitt navn, sum enn bert verður nýtt á Stíggi, navnið er „Bólið". Týdningurin av orðinum sigur, at her skal vera trygt, fjálgt. Soleiðis eru líkindi til at fáa eitt mennandi umhvørvið, so at nýggir førleikar kunnu spíra og verða til blómur.

Tá eg eri komin innar, fari eg upp nakrar trappur, sum eru í gongini. Síggi eina røð av skápum. Á nøkrum skápshurðum eru fotomyndir av dreingjunum. Komin longur inn, síggi eg, at fotomyndirnar ganga aftur. Tær eru á dagssetninginum, har fotomyndin er ovast, og síðan ein røð av myndum niðureftir, har dreingirnir síggja, hvat teir skulu gera, t.d. eta, ganga túr, fara heim o.s.fr.

Myndirnar, sum nýttar verða, eru boardmakermyndir, tó ávísar myndir eru fotomyndir. Boardmakermyndir verða nýttar, tí kanningar hava víst, at fólk við autismu eru visuelt sterk.

Beint við dagssetningin er eitt arbeiðsborð til hvønn dreingin. Vinstrumegin á arbeiðsborðinum er ein myndarøð, fyrsta myndin er ovast og seinasta myndin er niðast. Niðasta myndin er tekin um, at uppgávurnar eru fullførdar. Uppgávurnar standa frá vinstru til høgru, tær eru í kurvum og eru lagaðar til tann einstaka dreingin. Nakrar av uppgávunum verða tillagaðar soleiðis, at tær kunnu vera við í søluni hjá Stíggi. Tað kann eitt nú vera vøkur armbond og hálsbond. Aðrar uppgávur eru tillagaðar soleiðis, at víðari menning er møgulig.

Komin longur inn síggi eg eitt borð, sum verður nýtt til máltíðir, kaffi um morgunin og breyð á middegi. Dreingirnir keypa matin og gera hann til, so her er eingin matpakki. Nógv orka verður nýtt til at eta við knívi og gafli, tí hesin førleikin er týdningarmikil, og tað at eta saman er sera góð motivatión.

Longur inni er ein lítil, hugnaligur køkur, har dreingirnir baka bollar hvønn fríggjamorgun.

Komin longur inn síggi eg eitt høli við heingikoyggjum og stórari madrassu, og eg fái at vita, at dreingirnir trívast sera væl her inni. Ein hill er á vegginum við smáum kurvum, ein fotomynd av hvørjum dreingi er á kurvunum. Í kurvunum eru I-podar við oyramikrofonum. Eisini her er hugsað um hvønn einstakan, tí tónleikurin er tillagaður til hvønn drongin sær. Endamálið við myndunum er, at teir síggja og skilja, at teir eiga hvør sína kurv við útgerð.

## Stimbra hvønn annan

Stovnurin leggur dent á at menna og stimbra tær sterku síðurnar hjá hvørjum einstøkum. Tá ein torir at royna okkurt nýtt, fær ein annar hug at gera tað sama. Soleiðis eru tær sterku síðurnar hjá einum við til at menna sterkar síður hjá einum øðrum.

## Seta sær mál – mennast alt lívið

Øll læra og venjing tekur støði í tí einstaka. Arbeitt verður stig fyri stig við tí mest grundleggjandi; vit mennast alt lívið. Hóast stovnurin bert hevur virkað í stívliga hálvt ár, eru framstig at síggja. Frá fyrsta degi hava Ingrid og Julianna eygleitt dreingirnar og skrivað niður. Tí kunnu tær síggja eina menning hjá dreingjunun, eins og tey avvarðandi eisini kunnu.

## Námsfrøðin

Endamálið er, at starvsfólkið setur seg inn í støðuna hjá tí einstaka dreinginum og lagar námsfrøðina eftir førleikanum, soleiðis at dreingirnir kunnu mennast og gerast meira sjálvbjargnir.

## Gott og alneyðugt skeið

Ingrid og Julianna eru fegnar um at hava fingið møguleikan at luttaka á serskeiði, sum tær halda vera alneyðugt. Hetta er sera gott íkast til okkara grundútbúgving og tað, vit hava roynt at lisið okkum til, siga tær báðar.

*Orð og mynd: Tórfinn Smith*

# Studerandiforum í Helsinki

## 26. - 27. apríl 2011



*Simone Kristensen og Birgir Sondum saman við hinum luttakarunum*

26. apríl fóru Simone Christensen og Birgir Sondum á norðurlendskan fund í Helsinki í Finnlandi.

Simone lesur til námsfrøðing í 1.p, og Birgir lesur til lærara í 3.L, bæði á lærara-skúlanum í Tórshavn.

Tað var NLS (Nordiska Lärarorganisationers Samråd), sum bjóðaði á fund. NLS er eitt samstarv millum lærarafeløg í Norðurlondum á øllum útbúgvingarøkinum. Føroya Pedagogfelag og Føroya Lærarafelag samdust í felag um at senda ein lesandi úr hvørjum felag avstað á fund.

Fýra feløg fyri læraralesandi vóru umboðað á fundinum og haraftrat vit bæði úr Føroyum. Á fundinum løgdu øll feløgini fram um sítt virksemi, og hini sluppu síðani at spyrja spurningar; soleiðis var fundurin góður til, at vit kundu kunna og verða kunnað um arbeiðsroyndir og koma at kenna meira til útbúgvingarnar í Norðurlondum, og eisini um, hvussu feløgini arbeiddu fyri kor teirra lesandi og tí sosiala lestrarlívinum.

Tað var ótrúliga áhugavert at hoyra um arbeiðið hjá feløgum teirra læraralesandi. Tey hava nógvar limir, og summi arbeiða fulla tíð við hesum arbeiði, meðan onnur arbeiða har hálva tíð - hetta vísir, hvussu týdningarmikið tey halda hetta arbeiðið vera. Tey geva eisini bløð út í sínum londum, og soleiðis eru tey rødd teirra lesandi.

Eisini hevði Jari Lavonen, sum er professari og ein av teimum høgt virdu innan finska skúlaverkið, ein fyrilestur um lærara-útbúgvingina í Finnlandi, av tí at tey liggja hægst í PISA-kanningunum. Tað var sera áhugavert, og hann legði dent á, hvussu høgt lærara- og pedagogstarvið er virt í Finnlandi enn tann dag í dag. Lavonen dugdi sum so ikki at siga, hví finski skúlin er ovast í PISA-kanningunum, men hann leggur dent á, at góðir lærarar og góð leiðsla hevur stóran týdning. Eisini leggja tey stóran dent á í Finnlandi, at tey mugu hjálpa teimum veiku, tað vil siga lyfta botnstøðið upp.

Endamálið hjá NLS við fundinum var at kanna, um feløg teirra læraralesandi vóru við upp á at samarbeiða við NLS um at skapa eitt ráðgevandi forum sum ein part av NLS. NLS skal tískil skapa eitt arena fyri fundum fyri at fáa ávirkan á framtíðina, og endamálið er at hava aktiv lesandi og at hugsa politiskt.

Niðurstøðan er, at tað hevur verið sera áhugavert at luttikið á hesum fundi. Føroyar er sera lítið land við fáum lesandi í mun til hini Norðurlondini, og tí er tað trupult at gera eitt lestrarfelag fyri hvønn fakbólk, men hetta noyðist ikki at halda okkum aftur frá at luttaka á fundum. Tað er sera týdningarmikið, at føroyingar vísa áhuga og senda umboð til fundir og tílíkt, har møguleiki er. Nógvir av trupulleikunum á útbúgvingarøkinum eru felags í Norðurlondum, og tí er gott at møtast fyri at tosa um hugskot og royndir – tokið koyrir, óansæð um føroyingar eru við ella ikki.

Vit vilja hervið takka Pedagog- og Lærarafelagnum fyri, at vit fingu møguleika at luttaka á fundinum.




*Jari Lavonen, professari, hevði ein sera áhugaverdan fyrilestur um finska skúlan. Jari er "Head of department, professor of Physics and Chemistry Education" og er knýttur at University of Helsinki.*

*Myndin sýnir, hvat vit norðurlendingar halda um okkum norðurlendingar sum fólk.*






*Anders Rusk, sum er "ordførande" innan NLS, var skeiðsleiðari*



*Birgir og Simone*

# Bøkur frá Bókadeild Føroya Lærarafelags til børn og ung




## Tað glitrar og skínur

Tað glitrar og skínur er fitt, litrík bók til tey yngstu. Í bókini eru myndir av lutum, sum barnið kennir aftur frá sínum gerandisdegi: lastbilur, máni og gummlistivlar. Umframt sera litríkar myndir, kennast tær allar ymiskar. Krokodillan er ruflut, stivlarnir bleytir og jarðberið prikut. Hóast tað bert er ein mynd á hvørjari síðu, eru slíkar bøkur sera týdningarmiklar, tá hugsað verður um menningina hjá barninum. Umframt at barnið lærir orð og hugtøk, lærir barnið, hvussu ymsu litirnir kennast. Teir bjørtu litirnir og alt, sum er at netra við í bókini, fara at hugtaka børn. Bókin er sniðgivin soleiðis, at hon mennir sansa- og litfatan.

Bókin er úr hørðum pappi og er 12 bls. Marna Jacobsen týddi.




## Mumi – Krógva og blunda og Mumi – Summarbók við klistrimerkjum

Í fjør komu peikibøkur um Mumi til tey yngstu, eins og skúlabørnini fingu klassisku mumisøgurnar á føroyskum. Í ár eru tað tey 2-3 ára gomlu, ið fáa bøkur um Mumi. Talan er um tvær heilt ymiskar mumibøkur.

Onnur bókin: Mumi – Krógva og blunda er ein herlig bók um Mumitrøllið í vøkrum litríkum myndum.

Mumitrøllið og lítla Mý spæla krógva og blunda. Mumitrøllið blundar, og lítla Mý krógvar seg. Men hvar er hon? Krógvar hon seg í tjaldinum? Undir borðinum? Aftan fyri tíðindablaðið? Barnið sleppur at hjálpa Mumitrøllinum at lyfta lúkunum og leita eftir lítlu Mý.

Hin bókin er: Mumi -Summarbókin við klistrimerkjum

Nógv er at gera í Mumidali. Tú kanst svimja í sjónum og fáa tær at eta á sandinum. Hetta er ein øðrvísi bók við meiri enn 100 klistrimerkjum, sum barnið kann seta í tey tómu plássini á hvørjari síðu.

Marna Jacobsen týddi báðar bøkurnar




## Hin stóra bókin um familjur

Hvat er ein familja? Fyri fáum árum síðani var ein familja ein mamma, ein pápi og tvey, trý børn. Men hesi seinastu árini er familjumynstrið broytt kring allan heim. Familjurnar eru sum ælabogans litir - sera fjølbroyttar: tær eru ymiskt samansettar, og tað er ymiskt, hvussu persónarnir í einstøku familjunum eru saman. Í bókini fara vit at vitja nógvar familjur; vit fara við teimum út at ferðast, til arbeiðis, í skúla og fáa eitt sindur at vita um kelidýr, kenslur, familjutræ – og nógv annað…

Bókin hevur sum so einki aldursmark. Øll – eisini ella serliga - vit vaksnu kunnu læra nógv av bókini. Serliga hetta at rúma øðrum, sum eru øðrvísi enn vit. Bókin letur nevniliga upp fyri einum kjaki um, at hóast øll eru ymisk, hava vit somu rættindi at vera her. Mary Hoffmann skrivaði, Ros Asquith myndprýddi og Gunnleyg M. Arge týddi. Bókin er 36 bls.

## Tíðarbaðikarið hjá Proktori doktara

Bøkurnar um Proktor doktara kunnu samanberast við bøkurnar um Herviliga Henry? Tann sami stuttligi tráðurin, sum er í bókunum um Herviliga Henry, er eisini í bókunum um Proktor doktara. Tíðarbaðikarið hjá Proktori doktara er onnur bókin í røðini. Fyrra bókin, Prumpipulvurið hjá Proktori doktara, kom út í 2008.

Tað, sum eyðkennir bøkurnar, er, at tær eru stuttligar og spennandi. Børn og vaksin sita í skellilátri, tá tey lesa bókina, tí Ata, Boksi og Proktor gera tey undarligastu tingini.

Í hesi bókini fer Proktor at hitta gomlu kjerligheitina, sum er í París. Men stutt eftir at hann er farin, fáa Ata og Boksi eitt postkort frá honum, sum er skrivað á dulmáli. Proktor er í vanda, og Ata og Boksi gera skjótt av at fara at hjálpa honum. Og nú byrjar ævintýrið av álvara. Ata og Boksi ferðast í tíðarbaðikarinum, sum Proktor hevur uppfunnið, til París og til Napoleon í Waterloo – alt fyri at bjarga lívinum og kjerligheitini. Men tað eru ikki øll, sum ynskja, at Proktor skal liva lukkuliga allar sínar dagar.

Tað er kendi krimihøvundurin, Jo Nesbø, sum við bókunum um Proktor doktara roynir seg sum barnabókahøvund, og tað er hepnast sera væl. Bøkurnar um Proktor hava vunnið fleiri virðislønir, umframt at Tíðarbaðikarið hjá Proktori doktara var metsølubók í Noregi í 2008. Prumpipulvurið hjá

Proktori doktara var somuleiðis metsølubók í Noregi í 2007. Tann triðja bókin í røðini hevur júst vunnið: Norwegian Critics' Prize for Literature fyri 'Best Children's Book of the Year". Bergur Rasmussen týddi. Bókin er 338 bls. og innbundin.




## Eg síggi meg sjálva í einum brotnum spegli

Bei Bei Nowhere! Nú stingur Riina av til Stokhólm. Tað kemur ikki upp á tal, at hon verður eftir í Ongastaðni. Hon má víðari. Hon skal verða til okkurt. Í Stokkhólmi er vakri Álvur, ið hevur sítt egna orkestur, Camera Clara, sum veit tað mesta – og gátuføra Sofía, sum eingin veit sannleikan um.

Hetta er ein spennandi og sálarfrøðilig ungdómsskaldsøga um ektaðan kærleika og sonn og følsk vinaløg. Um deyðar mammur og livandi pápar. Um tann tú er nú, og tann tú vart áðrenn – um tú nú veitst, hvør tú ert. Riiana veit tað so ikki. Men hon ætlar at fáa greiðu á tí.

Eg síggi meg sjáva í einum stolnum spegli er sjálvstøðugt framhald av bókini Sangur til ein firvald.

Maria Kuchen er rithøvundur við serligum áhuga fyri ungdómi, andaligum spurningum og vísindi. Hon hevur eisini skrivað bæði yrkingar, skaldsøgur og yrkisbøkur fyri vaksin. Juli Fagerland týddi. Bókin er 164 bls. og heft við klaffum.


# Kjarnutrygging

Kjarnutrygging er til

- *gift*
- *ógift*
- *tey við børnum*
- *tey við serbørnum*
- *fyritøkur*

Kjarnutrygging tryggjar

- *øll sløg av bankaskuld*
- *upp til 1 mió. kr.*
- *skattafrítt útgjald*
- *útgjald uttan um búgvið*

Hugsa nýtt - hugsa tíni - hugsa Kjarnutrygging!

SUÐUROYAR SPARIKASSI


liv.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Hvør eftirløn hóskar best til tín?
Lív bjóðar sær at laga tína eftirløn til tað lívið, tú vilt liva, og ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Trygg eftirløn
Eftirlønin mennist javnt og støðugt, og tú fært trygd fyri fastari veiting.
Samansett eftirløn
Tað besta úr báðum: tú fært tryggleika, umframt møguleika fyri størri avkasti.
Marknaðareftirløn
Íløgan fylgir marknaðinum, og gevur møguleika fyri ávirkan og størri avkasti.
Innlit í útlit